# Kunngerðablaðið A

2009 Hefti 8

ISSN 0907-905X


Nr. 24

24. mars 2009

## Kunngerð um broyting í kunngerð um sjálvbodna trygging

**§ 1**

Í kunngerð nr. 63 frá 16. september 2004 um sjálvbodna trygging, sum seinast broytt við kunngerð nr. 6 frá 10. mars 2008, verður § 6, stk. 1 orðað soleiðis:

„**§ 6**. Tryggingargjaldið til sjálvbodnu tryggingina sambært § 21 í dagpeningalógini verður fyri tíðarskeiðið 1. apríl 2009 til 31. mars 2010 kr. 4.945.“

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi 1. apríl 2009.

Almannamálaráðið, 24. mars 2009

**Rósa Samuelsen (sign.)**
landstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen (sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um Húsalánsgrunn o.a.

### § 1

Í kunngerð nr. 55 frá 28. apríl 1998 um Húsalánsgrunn o.a. verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Í § 1, stk. 1, nr. 6 verður sum pkt. 2. sett:
Hesi lán eru ikki treytað av húsastødd sbrt. nr. 3 og 4."

**2)** § 6, stk. 1 verður orðað soleiðis: „Afturgjaldstíðin fyri lán úr Húsalánsgrunninum er hendan:
1) Fyri lán at byggja nýggj sethús og íbúðir og at keypa sethús og íbúðir er afturgjaldstíðin upp í 28 ár. Lánini kunnu veitast antin sum seriu- ella annuitetslán.
2) Fyri lán at endurnýggja, umbyggja og bjálva sethús og íbúðir er afturgjaldstíðin uppí 20 ár. Lánini kunnu veitast antin sum seriu- ella annuitetslán.
3) Lán, ið vera veitt at endurnýggja, umbyggja og bjálva sethús ella íbúð, sum eru ogn og bústaður hjá lántakara, kunnu vera veitt við serliga lagaligari rentu– og avdráttartreytum, um talan er um orkusparandi tiltak. Er lántakarin fólka-, einkju- ella fyrtiðarpensjónistur kann lánið verða rentu- og ella avdráttarfrítt í eitt tíðarskeið, sum Stýrið ásetur. Lán veitt eftir hesi skipan kunnu pr. hús ella íbúð í mesta lagi vera 150.000 kr. umframt kostnað av lántøkuni."

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fíggjarmálaráðið, 25. mars 2009

**Jóannes Eidesgaard (sign.)**
landsstýrismaður

/Petur Alberg Lamhauge(sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um brúkaragjald fyri børn á stovni hjá landinum

### § 1

Í kunngerð nr. 4 frá 30. januar 2007 um brúkaragjald fyri børn á stovni hjá landinum verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Í § 2, stk. 1 verður aftaná „samdøgursstovn“ sett: „ella aðra samdøgursfyriskipan“

**2)** Í § 2 verður sum stk. 3 sett:

„*Stk. 3.* Tá Høvuðsbarnaverndarnevndin setir barn á samdøgursstovn ella aðra samdøgursfyriskipan, sum landsstýrismaðurin hevur góðkent sambært § 33, stk. 4, rindar avvarðandi barnaverndarøki til landið sambært stk. 1.“

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi 1. apríl 2009.

Almannamálaráðið, 27. mars 2009

**Rósa Samuelsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/Eyðun Mohr Hansen (sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um skrá yvir heilivágssløg, sum eru heimilað tilskot

### § 1

Í kunngerð nr. 145 frá 2. juli 1993 um skrá yvir heilivágssløg, sum er heimilað tilskot, sum seinast broytt við kunngerð nr. 146 frá 14. desember 2001, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Í § 1, stk. 2 verður „75%“ broytt til: „50%“.

**2)** Aftaná § 1 verður sett inn:
**§ 1a.** Terminalsjúklingur fær sambært § 1, stk. 7 í lógini neyðuga heilivágin útflýggjaðan ókeypis frá tí degi, tá lækni skrivliga hevur váttað, at sjúklingurin væntast at liva í stutta tíð afturat, og at lekjandi viðgerð verður mett at verða nyttuleys.
*Stk. 2.* Váttanin frá læknanum skal innihalda hesar upplýsingar:
1) Navn, bústaður og P-tal hjá sjúklinginum.
2) Navn og starvsstaður læknans.
3) Diagnosa.
4) Váttan frá læknanum um, at sjúklingurin væntast at liva í stutta tíð afturat, og at lekjandi viðgerð verður mett at verða nyttuleys.
5) Dagfesting fyri útskriving frá sjúkrahúsi til terminalrøkt.
6) Undirskrift læknans.

**3)** Í § 2 verður „30%“ broytt til: „1,73%“.

**4)** Í § 2 verður sum nýtt stk. sett:
„*Stk. 2.* Landskassin endurrindar sjúkrakøssunum 100% av útreiðslunum til terminaltilskot sambært § 1, stk. 7 í lógini.

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi 1. apríl 2009.

Heilsumálaráðið, 27. mars 2009

**Hans Pauli Strøm (sign.)**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen (sign.)

# Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um útreiðslur sjúkrakassanna til heilivág og afturbering landskassans

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

## § 1

Í løgtinglóg nr. 115 frá 21. mai 1993 um útreiðslur sjúkrakassanna til heiluvág og afturbering landskassans, sum broytt við løgtingslóg nr. 135 frá 16. desember 1996, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 1, stk. 1 verður „75%" í tveimum førum broytt til "50 %"

**2.** Í § 1, stk. 3 verða orðini „ella 75%" strikað.

**3.** Í § 1 verður sett inn nýtt stk. 7, sum verður soljóðandi:
„*Stk. 7.* Sjúkrakassin rindar limum, ið eru terminalsjúklingar, 100% av útreiðslunum til heilivág, sum sambært lækna er neyðugur fyri at linna um støðuna hjá sjúklinginum."

## § 2

Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. apríl 2009 og er galdandi fyri allar forskriftir, sum eru latnar apoteksverkinum frá og við hesum degi.

Tórshavn, 30. mars 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. Nr. 68/2008

FØROYAPRENT